# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Halla Samuelsen komin í býráðið í Havn



Á býráðsfundi mánakvøldið tók Halla Samuelsen sæti í Tórshavnar býráð fyri Elina Lindenskov, sum hevur biðið um farloyvi hendan mánaðin.

Næstvaldur á listanum hjá Javnaðarflokkinum í Tórshavnar Kommunu er Tórfinn Smith. Men av tí at hann er fluttur úr kommununi, kann hann ikki taka sæti. Næst eftir hann er Bjørg Joensen, sum eisini er flutt úr kommununi. Nummar fimm á listanum er Halla Samuelsen - og tók hon tí sætið fyri Elina og røkir býráðsarbeiði næsta mánaðin.

Hetta er fyrstu ferð, at Halla hevur sæti í býráðnum. Men býráðsarbeiðið er ikki ókent fyri hana, tí pápi hennara, Leivur Johannesen (Leivur á Skála) sat í Tórshavnar Býráð umboðandi Javnaðarflokkin frá 1972-1992.

Steindor Hjaltalin, Tórshavn:

## 20 ára starvsdag hjá Føroya Shell



21. oktober 2005 hevði Steindor Hjaltalin í Havn 20 ára starvsdag hjá P/F Føroya Shell.

Steindor byrjaði á goymsluni hjá Shell í 1985, og seinastu 19 árini hevur hann verið oljufýrservisemaður.

Av frítíðarítrivum hjá Steindor kunnu við nevna t.d. renning, hann hevur runnið í fleiri ár og er ein av veteranunum í hesi ítróttargrein. Eisini dámar honum væl at fáast við seyð.

Steindor Hjaltalin er havnarmaður, føddur í 1949. Sum ungur róði hann út og hevði onnur arbeiði sum t.d. hýruvognskoyring.

Frá 1977-85 var hann ein av eigarunum av entreprenørfyritøkuni N. P. & S. Hjaltalin.

Steindor er giftur við Ann, og tey eiga 5 børn: Jan, Elisabeth, Allan, Rói og Sanna. Barnabørnini eru 8 í tali.

## Andlát og jarðarferðir

**Kristianna Beder Ellingsgaard,** ættað av Kykslið í Vági, andaðist 30. oktober í Esbjerg, 64 ára gomul. Jarðarferðin verður mikudagin 2. november kl. 10.30 úr kapellinum í Gravlunden í Esbjerg.

**Frits Witt,** Miðvágur, fer til gravar úr Miðvágs kirkju hósdagin klokkan 14. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Frits kunnu lata eina gávu á konto í Føroya Sparikassa.

**Una Olsen,** Tórshavn, andaðist 31. oktober, 68 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Fríðbjørg Midjord,** búsitandi í Breidalsvík í Íslandi, ættað úr Hovi, andaðist leygardagin 29. oktober, 62 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Heydals kirkju leygardagin 5. november klokkan 14.

Kistan við **Dánjali Sjúrði Ennistíg,** Klaksvík, fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi heim í Betesda í kvøld klokkan 18. Jarðarferðin verður mikudagin klokkan 13:30. Tey, ið vilja minnast Dánjal kunnu lata eina peningagávu inn á konto hjá børnunum í Norðoya Sparikassa.

**Leif Lamhauge,** í Dalinum, Lamba, búsitandi í Havn, andaðist í heiminum 30. oktober, 79 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mikudagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Leif kunnu lata Føroya Felag Móti Krabbameini eina gávu. Konto í peningastovninum.

## Nýggj Firvaldsbók

**Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út Firvaldsbók 5, sum Gunnvá Dam hevur skrivað og Olivur við Neyst hevur teknað.**

ÚTGÁVA
*tíðindaskriv*



*Gunnvá Dam, sum er lærari í Kollafjarðar skúla, hevur skrivað allar Firvaldsbøkurnar, sum Olivur við Neyst hevur myndprýtt*

Firvaldsbøkur eru eykatilfar í byrjanarundirvísingini í føroyskum. Bøkurnar eru ikki ætlaðar til ávíst floksstig, men tær kunnu verða nýttar í eini næmingalagaðari undirvísing, so at næmingurin kann, sjálvur ella saman við lærara, arbeiða á tí stiginum, sum hann er á.

Umframt at vera eykatilfar til næmingar, ið arbeiða skjótt, kunnu bøkurnar eisini nýtast sum stuðul at læra seg at lesa – her undir eisini sum serundirvísing.

Mangar uppgávur eru sjálvrættandi, t.e. at annaðhvørt hava tær eitt loysunarorð, ella eisini siga tær, hvussu nógv orð næmingurin skal finna. Niðast á síðuni eru nøkur orð í einum gráum kassa. Hesi orðini kann næmingurin nýta at styðja seg við, tá ið hann loysir uppgávuna.

Uppgávurnar eru stuttligar at loysa og tær livandi strikumyndirnar hjá Olivuri við Neyst skapa forvitni og áhuga.

Umframt at vera eykabók í byrjanarundirvísing eigur Firvaldsbók 5 helst eisini at gera sítt til at økja um hugin hjá næmingunum at læra seg nýggj orð og setningar – og at ogna sær gott arbeiðslag.

Føroyaprent hevur prentað bókina, sum telur 56 blaðsíður við hópin av myndum.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið hjálptu og vístu samkenslu og fylgdu okkara kæra bróður

**Andreas Richardt**

til gravar.

Takk fyri blómur og kransar.

**Systkini**

**90 ár**

Mikudagin 2. november verður Jonhild Henriksen, Gerðar, Klaksvík 90 ár. Hon verður at hitta á Røktarheiminum frá kl. 16.00 sama dag.

**Dagurin í morgin**

**2. november. Alla sálna dagur.** Umleið ár 1.000 kemur í tann siður at halda minningarorð fyri øll, sum farin vóru, og ikki bara fyri halgimennini.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!